# Vil ikki spæla fyri Kinnear

Charles N'Zogbia, sum spælir við Newcastle, vil ikki longur spæla fyri Joe Kinnear, sum er manager í felagnum. Eftir tapið hjá Newcastle móti Manchester City týsdagin hevði Joe Kinnear stórar trupulleikar við at úttala navnið á N'Zogbia, og tí vildi spælarin ikki finna seg í. N'Zogbia hevur leingi havt eitt ynski um at koma úr felagnum, og nú sigur hann, at støðan er ovboðin fyri seg.



# Venjarin bíðar

Tað verður ikki hesumegin vikuskiftið, at Fótbóltssambandið almannakunngerð navnið á nýggja føroyska landsliðsvenjaranum. Høgni í Stórustovu, FSF-forseti, hevur júst verið uttanlands í øðrum ørindum, og hann sigur, at her og nú hendir einki. – Vit arbeiða okkum sjálvandi fram móti málinum, men vit skulu í øllum førum yvir um vikuskiftið, áðrenn ein venjari er settur, segði hann hóskvøldið.

KÍF-Neistin 24-32 (6-14):

# Eitt korter – og alt avgjørt

**Við framúrskarandi spæli í Neista-málinum syrgdi ungi Ári Dam fyri, at kollfirðingar bara fingu eitt mál tað fyrsta korterið av seinnu hálvfinaluni í Kollafirði í gjárkvøldið. Tá Neistin samstundis skoraði 10 ferðir, var alt avgjørt, áðrenn dysturin nakrantíð var komin ordiliga í gongd.**

HONDBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*



*Ári Dam stendur klárur í málinum hjá Neistanum, og hann var høvuðsorsøkin til, at Neistin so lætt kundi spæla seg í steypafinaluna. Fyrsta korterið av dystinum í Kollafirði í gjárkvøldið læt hann bara eitt mál fara ígjøgnum, og tað var eitt brotskast í fyrsta minutti…*

*Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir*

Klokkan á máltalvuni í vælfyltu høllini í Kollafirði vísti 15:51, tá KÍF fyri aðru ferð í dystinum megnaði at skjóta mál. Hini tølini á talvuni talaðu fyri seg, tí har stóð tá 2 til KÍF og 10 til Neistan. Í grundini kundi dysturin verið avblástur og trý korter við sveitta og baksi kundu verið spard, tí tá var longu alt avgjørt.

Ikki tí, KÍF hevði havt sínar møguleikar, og fleiri av teimum vóru bæði góðir og stórir. Men fyri kollfirðingum stóð ein ungur maður, Ári Dam, ið snøgt sagt tók alt! Enntá púra blankir fyri málinum, fingu teir ikki mál, og myrkrið seyg so spakuliga niður yvir tey frammanundan so bjartskygdu heimaviðhaldsfólkini.

Damir Oros, sum eftir skurðviðgerð í knænum var við fyri fyrstu ferð leingi, skoraði beinanvegin við brotskasti, men minuttin eftir fekk Neistin svarað aftur, og so byrjaði annars oyðimarkargongdin hjá kollfirðingum, ið bara ikki vildi fáa ein enda.

### Munurin etin upp

Fyrru hálvfinaluna vann KÍF við tveimum málum, men tann munurin var skjótt etin upp, tí samstundis sum Ári Dam í Neista-málinum vísti bjargingar av øllum møguligum slagi, óansæð hvørji kynstur kollfirðingar royndu, var heldur lætt hjá Neistanum at fáa bóltin inn í hinum endanum.

– Vit høvdu eina tendraða verju og ein málmann, sum tók sera nógv tað fyrsta korterið, samstundis sum menn komu til skot og fingu mál akkurát – einar tríggjar ferðir enntá umvegis málmannin hjá teimum. Hinvegin fóru tær mongu skotroyndirnar hjá kollfirðingum á okkara málmann og út, staðfesti spælandi venjarin hjá Neistanum, Ingi Olsen, eftir dystin.

– Hjá okkum ráddi um ikki at leypa framav, sum vit gera í so ofta, og tað eydnaðist. Vit kundu róliga og stillisliga byggja okkum eina trygga leiðslu upp, samstundis sum mótbrekkan hjá teimum gjørdist størri og størri. Og hóast teir royndu at stríða seg innaftur í dystin, bleiv hvørt mál hjá okkum aftur eitt stór afturstig fyri kollfirðingar.

### Uppiborið finalupláss

Meðan støðan enn var 9-1 til Neistan, fekk Birgir Poulsen reyða kortið frá dómarunum, tí hann var heldur ófantaligur, tá Arnbjørn Hansen leyp inn frá strikuni, men sjálvt í undirtali megnaði Neistin at skora til 10-1, áðrenn KÍF næstu løtuna fekk eini trý mál á rað og hevði hug at nærkast eitt sindur.

Men skjótt hevði Neistin fótað sær aftur, og so gekk dysturin sína gongd, uttan at kollfirðingar nakrantíð fingu fatur í rætta endanum.

Heldur ikki gjørdu teir sakina lættari fyri sær sjálvar við at verja offensivt, tí teir fingu ongantíð ordiliga fatur í álopsspælinum hjá Neistanum, sum stórt sæð ótarnað slapp at ganga sína gongd, júst sum Neistin vildi hava tað.

Bara eina løtu í seinna hálvleiki hevði Neistin hug at sløsa eitt sindur, men heldur ikki tað hjálpti stórvegis upp á støðuna hjá KÍF, sum ikki hevði neyð-ugu styrkina og dygdirnar til at gera stórvegis við Neistan.

At »teir bláu«, sum í gjárkvøldið vóru hvítir, uppiborð vunnu seg í finaluna við samanløgdum sigri, kundi eingin mótmæla, tá trý korter vóru spæld aftur at tí eina, sum avgjørdi alt.

## FAKTA um dystin

**KÍF-Neistin 24-32 (6-14)**
**10 min:** 1-6
**20 min:** 3-10
**30 min:** 6-14
**40 min:** 11-21
**50 min:** 17-25
**Málskjúttar**
**KÍF:** Damir Oros 8, Ási Dam 5, Niklas Reginsson 4, Gert Hansen 3, Jákup Trúgvason 3, Arnbjørn Hansen 1
Neistin: David Edvardsen 9, Áki Mørk 7, Jugoslav Djumic 5, Bogi Berg 3, Ingi Olsen 3, Finnur Hansson 2, Tróndur Kragesteen 1, Jón Ludvík 1, Birgir Poulsen 1
**Brotskøst:** KÍF 6, Neistin 3
**Útvísingar:** KÍF 2, Neistin 4
**Diskvalifikatiónir:** Neistin 2
**Dómarar:** Rúni Mohr & Ragnar Simonsen

Neistin í finaluna við samanløgdum 59-53 sigri

## Ári beindi fyri KÍF

**Tað var ein ovurfegin Ári Dam, sum eftir dystin kundi fáa herðaklapp í hópatali frá bæði liðfeløgum og fjepparum. Og hann hevði tað so dyggiliga uppiborið, tí við málmansspæli í serflokki tað fyrsta korterið av dystinum, syrgdi hann fyri at taka sær av stórt sæð øllum, ið slapp inn um verjuna hjá Neistanum.**

**– Verjan stóð heilt fantastiska væl og tað gjørdi so, at eg sum málmaður eisini kundi standa sera væl. Alt gekk í byrjanini, sum tað skuldi, og eg haldi, at vit allan dystin á tamb høvdu fult tamarhald á, segði málmaðurin, sum nú gleðir seg til at spæla steypafinalu ímóti Kyndli um eina viku:**

**– Tað kennist heilt ótrúligt, og eg havi ikki ordiliga fatað tað enn. Men eg gleði meg til at spæla finaluna, og tað verður ein feit upplivingin!**

**Gert Hansen, sum var á besta liðnum hjá kollfirðingum fyri fyrstu ferð í meira enn eitt ár, staðfesti eftir dystin, at fyrsta korterið avgjørdi alt til fyrimuns fyri Neistan:**

**– At teir vóru á odda 10-1, tá eitt korter var farið, sigur alt. Vit kunnu takka okkum sjálvum, tí vit høvdu kjansin. Eg hevði vónað, at vit kundu klára tað, men tað gekk tíverri ikki, segði hann.**

# Skaðar níva ikki danska HM hópin

**Danmark og Frakland spæla HM-hálvfinalu í dag**

HONDBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Danir telja niður. Kl. 16.30 í dag skal danska hondbóltslandsliðið spæla tað fjórðu hálvfinaluna, síðani EM í 2006. Hesaferð er talan um HM-hálvfinalu ímóti Fraklandi, sum er olympiskur meistari. Danmark er europameistari, og er talan um eitt satt meistaramøti.

Sambært læknanum hjá danska HM-hópinum, Steen Bo Kalms, so stendur eisini væl til hjá dønum, hvat viðvíkur skaðum: - Tað sær veruliga gott út. Eg havi ikki verið við til endaumfør, har tað hevur sæð so gott út, aftaná 8 dystir. Spælarnir eru væl fyri. Sigur Kalms til danska TV2.

Útsagnirnar hjá Steen Bo Kalms merkja kortini ikki, at onkrir av spælarunum hava smáskaðar. Men Kalms leggur dent á, at hesir spælarnir eru moyrir og eymir, aftaná mongu dystirnar. - Teir eru eymir, men tað er ikki verri, enn tað hevði verið, um vit aðrir høvdu verið úti í urtagarðinum og grivið í nakrar dagar. Hesir spælarnir eru í góðara venjing, og teir tola nógv av, og tað hevur nógv at siga. Sigur danski landsliðslæknin.